# Góðkenning

## I Stutt leiðbeining um, hvussu váttað verður, at vøra er vistfrøðilig.

## Hvussu søkt verður um váttan

Set teg í samband við MBM, ella undirritaða sum síðani kann vegleiða teg víðari. Bið um umsóknartilfar og eisini vistfrøðiligu viðtøkurnar, um tú ikki longu heldur tar.

Fyll umsóknina út og tey skjølini, sum skulu vera við, og send tað til TÚN í Íslandi. Minst til at leggja við eitt tvítak av korti yvir garðin og eina umskipingarætlan.

Síðani ger TÚN eitt ummali av umsókn tíni og tilnevnur eitt umsjónarfólk, sum so fer at seta seg í samband við teg, so tit kunnu finna ein dag og eina tíð, til eina vitjan.

Umsjónarfólkið sýnir garðin, bøin og bygningarnar, sum hoyra til garðin, fenaðin og tólini, og skrásetingar og onnur skjøl, sum hoyra til fyritøkuna. Inspektørurin skrivar síðani eina frágreiðing til TÚN, ið skal geva váttan, í frágreiðingini verður í stórum dráttum sagt frá, um okkurt ikki er, sum tað eigur, og um inspektørurin hevur rakt við nakrar trupulleikar, tá ið sýnað varð.

Inspektørurin er ikki ráðgevi, men kann gera vart við tey mál, ið eru fyrisett, og bjóða sar til at tulka tey fyri tar. Kortini eigur at verða spurt um alt annað beinleiðis hjá TÚN sum skal geva váttan. Vottunarstovan TÚN fer at royna at hjálpa, ella eisini vísa tær víðari til onkran, sum far givið tar ráð, ið hava týdning fyri málið.

Frágreiðingi frá umsjónarfólkinum er grundarlagið, tá ið nevndin, sum skal geva váttan, fer at viðgera umsóknina hjá tar. Nevndarskrivarin fer at geva tar boð um ta avgerðina, sum nevndin er komin til, og siga tar frá treytunum fyri at fáa váttan.

Tá ið tú hevur lokið treytirnar, fart tú eina váttan, so tú teir nastu tólv mánaðirnar, tá ið tú skalt selja og lýsa við vørunum, sleppur at nýta tað váttanarbúmerkið, sum bara stendur á vørum, ið eru undir váttanareftirliti.

## II At gera seg til reiðar til at fara undir vistfrøðiliga framleiðslu og til at fáa váttan.

**Man loysa seg hjá mar at halda vistfrøðiligu leiðina?** Fyrst av øllum er at kanna eftir tí, sum fyrst og fremst eyðkennir vistfrøðiligan landbúnað, og meta um, hvørt tað ber til at halda hesa leið, og um hetta er áhugaverd loysn. Tað eru hyggjuráð frammanundan at kanna sølumøguleikarnar og at skifta orð við bøndur, sum longu hava roynt vistfrøðiligan landbúnað.

**Yvirlit yvir garðin –** Kort og strikumynd av jørð og bygningum. Tá ið tú fert undir umskipanina, krevst mangan, at garðurin verður umskipaður og broyttur. Til tess at seta sum minst í váða og fáa sum mest burturúr, er umráðandi at hava gott yvirlit yvir alla gongdina, t.e. jørðina, bygningarnar,

tólini og fenaðin. Tað loysir seg at byrja við einum korti: Fáa sum fragast burtur úr tí gamla kortinum, bøta um tað ella gera eitt nýtt, sum vísir, hvussu alt er býtt sundur í partar.

**Hvussu jørð og bygningar verða nýtt.** Hvat hevur jørðin verið nýtt til tey seinastu 3-4 árini? Hvussu var hvør partur nýttur? Á hvørjum einasta petti av bønum eigur at verða kannað eftir, hvør ið hevur gingið á biti har, hvussu tað er velt og heystað. Hygg at, hvussu bygningarnir síggja út, og hvussu teir verða nýttir, og hvørji líkindini eru til at hava og goyma vistfrøðiliga grøði og fenað, meðan garðurin verður umskipaður.

**Hvussu tilfar, ið ikki er loyvt at nýta, hevur verið nýtt –** Gera av, hvar ið byrjast kann. Hvørji taðingarevni hava verið nýtt á teimum ymisku pørtunum av bønum? Munnu nøkur støð vera, har ið eingi evni hava verið nýtt tey seinastu árini, so at tú skjótari sleppur at fara undir vistfrøðiligan landbúnað?

**Fruktagóð mold** – Lykil til valeydnaðan vistfrøðiligan landbúnað. Síggj til, at moldin á garðinum hjá tar verður kannað sum skjótast, tá fart tú at vita, hvørji lívsneyðug føðsluevni, pH og lívrunnin evni eru í henni ella ikki, og tú kanst í góðari tíð fara at gera nakað við moldina, hevur hon tvørrandi javnvág, ella um henni trýtur eitthvørt.

**Leita tar ráð frá teimum serkonu.** Far til serfrøðingar, tá ið tú leitar tar ráð um vistfrøðiligan landbúnað, ella til fólk, ið eru roynd, tá ið tað kemur til vistfrøðiligan bóndaskap. Vanliga fara tey at geva tar hent ráð um, hvussu tú fart bøtt um moldgóðskuna, hvussu tú fart hildið skil á umskiftinum frá einari grøði til aðra, greiða tar frá ymiskum smarusløgum, sum tykjast vera val eydnað o.s.fr.

**Les viðtøkurnar.** Fá tar hendur á viðtøkunum um vistfrøðiligan landbúnað. Onga aðrastaðni verður so gjølla lýst, hvussu tú eigur at fara fram, og hvørji evni, tú sleppur at nýta. Um tú framvegis ivast í krøvunum, vend tar tá til teirra, sum hava givið viðtøkurnar út, og fá tey at greiða tar narri frá (vanliga eru tað tey somu, sum skulu geva váttanina).

**Ert tú til reiðar at søkja um váttan?** Komin so langt, eigur tú at meta um, hvørt ið tú ert sinnað/ur at fylgja viðtøkunum og sostatt (a) bara nýta tað tilfar, ið loyvt er at nýta, (b) ganga undir tey broytingartíðarskeið, ið fyrisett verða, (c) velta soleiðis, at góðskan á moldini batnar, (d) sleppa tar undan at hava tvar framleiðslur í senn, meðan broytingin fer fram (nýta somu sløg av plantum vistfrøiliga og vanliga), (e) fara undir hóskandi skráseting av garðinum og (f) geva teg undir viðtøkurnar fyri, hvussu framleiðslan eigur at verða goymd, flutt og pakkað. Um svarið er játtandi, set teg tá í samband við hann, ið skal geva tar váttan, og bið hann geva tar umsóknartilfar.

**Orða broytingaratlan.** Um tú ikki enn heilt ert farin undir vistfrøðiligan landbúnað, men kortini hevur hug at søkja um váttan, eigur tú at gera eina skrá yvir, hvussu garðurin hjá tar kann fara úr vanligum landbúnað og yvir í vistfrøðiligan landbúnað. Henda atlan eigur at verða løgd aftur at umsóknini hjá tar til hansara, ið skal geva váttan.

**Bøt um skrásetingina.** At val verður skrásett, er avgjørd treyt fyri val skipaðum og valeydnaðum landbúnaði. Men skrásetingin gevur tar eisini ein lykil til vistfrøðiliga váttan. Er skrásetingin vánalig, kann tað hava við sar, at tað fer at bera illa til, kanska verður ógjørligt at hava umsjón við garðinum. So skjótt sum tú atlar tar at søkja um váttan, eigur tú at síggja til, at tú skrásetir íløgur og tað, sum fast burturúr, og at tú førir dagbók yvir, hvussu tú nýtir jørðina og skipar fenaðin.